LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

1 DAGUR Løgtingsvalið 2008

# Roynhøllin 14-1



Val

NITA NÆS

Javnaðaflokkurin

Ja, heit var eg í Roynhøllini. Tí – í 2008 leggur eitt modernað vælferðarsamfelag ikki ein skúla á eitt øki sum er virki frammanundan.

Í Hvalba skulu vit eisini hugsa um okkara egnu børn og ungu.

Eg sakni eitt frítt kjak um eftirskúlan.

Tá politikarar siga við harðari rødd at:"Um hvalbingar ikki vilja hava skúlan – so skulu teir bara vita, at aðrar kommunur standa og skríggja eftir skúlanum", so kenni eg tað, sum at vit eru við í einari kapping um at fáa skúlan, og tað kann ikki vera meiningin.

Vit mugu virða tey ungu meira her á landi. Vit kunnu ikki bara tosa um tey, sum um tey eru 90-milliónir verkætlanir, sum kommunur kunnu kappast um og hótta hvørja aðra við.

Ella sum politikarar kunnu fiska atkvøður uppá.

Sjalvandi vil eg eisini hava skúlan til Hvalbiar, men eg fari ikki at renna kapp í eini verkætlan, hvørs innihald er menning av okkara ungu.

Trúgv mær ella ikki Føroya Fólk: Eg bleiv so rúkandi ill, tí eg haldi, at vit í Føroyum skalta og valta við teimum ungu uttan veruliga at leggja alla okkara orku í at ganga teimum mest møguliga á møti.

Nei, mítt stríð er at fáa einar frælsari, javnstøðugari og samhaldsfastari Føroyar – ungdóminum fyrst og fremst at frama.

# Føroyar og alheimurin



Val

POUL MICHELSEN

Fólkaflokkurin

Ótrúligir møguleikar liggja

- í betri samskifti og samhandli við útheimin.
- Betri flogsamband við útheimin raðfestast fremst: Nýggjan altjóða flogvøll
- Eitt føroyskt uttanríkismálaráð við landsstýrismanni í uttanríkismálum og sendistovum kring heimin
- Okkara egna lið av diplomatum
- Handils- og samvinnusáttmálar við onnur lond um øll samfelagsøki
- Limaskapur í EFTA trároynast
- Útlendskar fyritøkur betri atgongd til føroyska marknaðin
- Føroyskar fyritøkur betri atgongd til altjóða marknaðin
- Opnan arbeiðsmarknað

# Ítróttur, tónleikur og mentan



Val

DÁNIAL PETUR HANSEN

Sjálvstýrisflokkinum

Hesi øki mugu á breddan nú:

Fíggjarlógin sigur rættuliga nógv um hvussu høgt tann politiski meirilutin raðfestir.

Tá talan er um ítrótt, hevur hendan játtan til ÍSF staðið í stað á 2,0 mió. kr. líka síðani fyrst í 90'unum, játtanin til ferðastuðul er enntá lækka seinastu árini, og játtaninar til eitt nú FSF og ÍSB hava staðið í stað rættuliga leingi.

Tá talan er um tónleik hevur bert verið talan um eina fimm siffraða upphædd alt seinasta valskeið.

Játtanin til mentunargrunnin hevur eisini staðið í stað alt valskeiðið.

Játtanin til Tjóðpall Føroya hevur somuleiðis verið tann sama sum við byrjanina á farna valskeiðið, og soleiðis kundi verið hildið fram.

Í komandi valskeiðið er neyðugt at raðfesta hesi øki munandi hægri!

# Ferðagjáld-Bummgjáld



Val

HEINI O. HEINESEN

Tjóðvekdi

Tað eigur at kosta tað sama at koma til havnar, óansæð hvar tú býrt í landinum í Suðuroy ella úti í Fugloy.

Hetta kann væl lata seg gera, um vit í framtíðini bert hava tvær gjaldstøðir. Eina norðanfyri høvuðsstaðin, og eina sunnanfyri høvuðsstaðin. Sjálvandi noyðast vit at fyrihalda okkum til tað sum í dag í lítlan mun, er fíggja við bummgjaldi.

Nú talan er um, at gera tunnil inn á Skálafjørðin, er hetta ein upplagdir møguleiki uttan at nakar skal gjalda meira av teirri ørsøk. Hetta er ein solidarisk skipan, sum alt samfelagið fær gagn av.

Skálafjarðartunnilin kemur at verða ein pengamaskina í alla framtíð, uttan at gera skaða fyri nakað virksemi. Sambært tí ætlan, sum ABC samgongan hevur, skal hetta business projekt leggjast til eitt privat partafelag, at byggja og reka. Hetta prosjekti kundi gjørt tað, at øll í Føroyum kundi koyrt ella silgt til havnar, fyri sama kostnað. Hetta er treyta av, at tað verða bert tvær gjaldstøðir tá koyrt verður ígjøgnum, ein á norðurleiðini og ein á suðurleiðini.

Politikkurin hjá ABC samgonguni er, at tey prosjektini sum kosta nógvan pening skal skattaborgarin gjalda, meðan tey sum kunnu geva pening í alla framtíð, vera latin til eitt privat partafelag at reka. Uppá longri sigt kann peningamaskinan skálafjarðartunnilin, verða við at gjalda fyri víðari útbyggingar av samferðslunetinum í Føroyum.

# Glað børn og ábyrgdarfull vaksin



Val

ÓLUVA NICLASEN

Javnaðaflokkurin

Pisaskelkurin rakti eisini børnini. Sonur mín spurdi um tað passaði, at børnini í Føroyum vóru býttari enn onnur børn. Nei, mátti eg siga. Tit eru líka klók, deilig, fitt og frek, sum øll onnur børn í heiminum.

Legði afturat, at kanningin vísti bara, at tað eru nøkur ting vit vaksnu kunnu gera betri, tá ið vit undirvísa og hjálpa tykkum við heimaarbeiðinum.

Øll vilja vit børnum tað allar besta. Tí ganga vit eisini høgt upp í skúlan. Tað er jú ikki eitt heilt vandaleyst tiltak, at seta 24 børn inn í eina skúlastovu, frá tey eru 7 ár til tey koma út aftur 16 ára gomul. Avbjóðingin er, at fáa øll hesi árini at eydnast hjá børnunum. Málið er, at tey ungu koma út aftur styrkt við kunnleika, amboðum at nema sær enn størri vitan, sterkum sjálvsáliti og góðari sjálvsvirðing, við einari óvikaligari tráan eftir lívinum. Og tað kann undir ongum umstøðum góðtakast, at hendan roynd miseydnast.

Her áliggur tí politisku skipanini, við nærlagni, alla tíðina at fylgja við og geva skúlanum neyðugu umstøðurnar, so vit kunnu røkka hesum høga málið.

Lat tað ikki vera nakar ivi um, at børnini og lærararnir í fólkaskúlanum liggja Javnaðarflokkinum tætt at hjartanum.

Í valskrá sínari hevur Javnaðarflokkurin tí skotið upp, at:

Lærarar skulu hava kandidat útbúgving

- Verandi lærarar skulu góða eftirútbúgving
- Økistilboðið til børn við serligum tørvi verður útbygt
- Tvílæraraskipan í fyrsta flokki
- Liðiligar loysnir við tímapuljum á skúlunum
- Meira føroyskt tilfar út til børnini

Latið okkum fylkjast um skúlan, børnini og lærararnar. Saman røkka vit málinum.

# Hygg hvat eg fann, 20 milliónir til mentan



Val

JÓNLEIF JOHANNESEN

Javnaðarflokkurin

Landið ætlar at keypa 800 málningar frá Føroya Banka fyri áleið 24 milliónir kr. Servitanin sigur at 20 málningar er nokk. Teir kosta áleið 3 milliónir kr. Eftir eru góðar 20 milliónir kr. mentanini at frama. Eg ætli at brúka pengarnar soleiðis:

7 mió. til Tjóðpall Føroya.

4 mió. til vistferðavinnu og mentan á útoyggj.

4 mió. til at fjálga og menna menturnar spírar kring landið.

2 mió. til rithøvundalønir.

2 mió. til at styrkja viðurkendar kreftir innan mentan.

1 mió. til føroyskan dans og kvæðir.

1 mió. til føroyskt bátasmíð og mennan av føroyskum rossum.

Latið okkum styrkja samleika og menna mentan okkara í felag.

# Ein tunnil útilokar ikki ein skúla



Val

RODMUND NIELSEN

Fólkaflokkurin

Havandi í huga framtíðar menning av samfelagnum, er tað týðandi, at samferðslan verður útbygd, her verður hugsað um tunnlar undir og omanfyri sjóvarmálan og vegir. Og er tað av størsta týdningi at fíggingarmynstrið av hesum íløgum verður soleiðis, at tað eisini er pláss fyri øðrum útbyggingum av samfelag okkara, sum skal mennast enn meira komandi árini.

Íløgur í samferðslukervið eiga ikki at vera blandaðar saman við eitt nú bygging av skúlum og ellisheimum. Við skilagóðari fíggjarstýring og við dirvi at hyggja inn í framtíðina verður pláss fyri báðum.